# Mannfólkamótin í summar

Nú nærkast summarið veruliga. Kvøldini gerast longri og ljósari, og gleðin yvir summarið tykist vera sjónlig ímillum fólk her á landi. Fólk eru heldur ikki í eins nógvum og heitum klæðum hesa ársins tíð, tí ofta velja tey at keypa tynri klæðir, sum passa betur til summarið.

Ein av fremstu mótahandlum í Føroyum er Skálkur, sum selur mannfólkaklæði. Sosialurin hevur tikið eitt prát við dagliga leiðaran í Skálki, Hávard, har hann sigur eitt sindur um summarmótan.

Hávard heldur fyrst og fremst, at menn og dreingir í Føroyum eru farnir at hugsa meir um, hvørjum teir ganga í.

- Ja, tað er eingin ivi um, at dreingir og menn í Føroyum eru blivnir meir bevístir um, hvat tað er, teir keypa. Teir keypa oftast merkivørur so sum Bjørn Borg, WESC, Diesel, Dolce & Gabbana og onnur, og teir ganga eisini høgt uppí, at klæðini sita væl á kroppinum.

- Annars er tað móti hjá dreingjum at ganga í víðum hettutroyggjum, covboybuksum og tennisskóm í dag. Hetta er nakað, sum selur avbera væl. Hvítar covboybuksur er eisini nakað, sum fer at selja meir ímillum mannfólkini í summar, heldur Hávard.

Hávard leggur afturat, at tað verður eingin ávísur litur, sum verður á móta í summar. Tað verður ein blandingur av øllum, men har koma tó nógv klæði í sterkum litum og í neon til landið.



*Dreingir og menn í Føroyum eru blivnir meir bevístir um, hvat tað er teir keypa, og hvørjum teir ganga í. Teir keypa oftast merkisvørur so sum Bjørn Borg, WESC, Diesel, Dolce & Gabbana og onnur*




















